VIÐMERKINGAR

## Rættleiðing til Virgar T. Dalsgaard

**Jóanes E. Árting, aðalskrivari**
*Vegna stjórn FUR's*

Í stórari grein í Sosialinum 1. februar nevnd "Norðuratlantisk Manipulatión", skrivar Virgar T. Dalsgaard soleiðis:"Tað er ikki nakað nýtt, vit vita øll, hvussu grádigt unga tjóðveldið hevur lagt seg á danskan tipspening í Føroyum, so at flestu onnur politisk føroysk ungmannafeløg hava verið við sviðið soð!"

Hetta er bert lítið brot úr greinini, men stjórn FUR's heldur ikki, at eitt so grovt álop á arbeiðið hjá Føroya Ungdómsráð (FUR), sum umsitur og býtur út 20 % av tipspengunum í Føroyum, kann fara óátalað aftur við borðinum. Virgar T. Dalsgaard fær tað at ljóða sum um, at tað eru albógvar og frekleiki, sum eru avgerðandi fyri, hvussu nógvar pengar tey 19 ymisku landsfeløgini í FUR, harímillum fimm polittisk ungmannafeløg, fáa burturav tipspengunum og tað er beinleiðis ósatt!

Sannleikin er, at tað er "reglugerð fyri býti av stuðli frá Spf. Ítróttarvedding" — faktiskt ein rættuliga strang reglugerð, ið fult og heilt avgerð, hvussu býtið fer fram. Leggjast kann afturat, at reglugerðin er at finna á heimasíðu okkara www.fur.fo.

At Unga Tjóðveldið hvørt ár hevur sókt um hendan stuðul, skulu tey heldur hava rós fyri, tí tað vísur, at tað er eitt aktivt ungdómsfelag, sum arbeiðir miðvíst við tí, tey nú halda, er rætt. Tað má væl verða tað besta, vit sum samfelag kunna gera fyri okkara ungdóm — at eggja og stuðla teimum til at arbeiða við tí, sum tey halda vera rætt, ístaðin fyri at niðurgera tað, at tey nýta teir møguleikar tey hava fyri stuðli í teirra arbeiði, m.a. frá Føroya Ungdómsráð.

Fyrsta august 2003 bleiv útrokningargrundarlagið fyri, hvussu nógv av tipspengunum skal býtast út í Føroyum, broytt. Áðrenn var tað soleiðis, at ein fastur procentpartur av yvirskotinum hjá Dansk Tipstjeneste fór til Føroyar, men síðan august 2003 er bara yvirskotið av tí sum verður veddað fyri í Føroyum flutt aftur til okkum at býta út her — at upphæddin er størri nú enn áðrenn, er ein onnur søga.

## Borgarstjórin á Tvøroyri hóttir als ikki nakrar kommunur í Suðuroy

VIÐMERKING

Tvøroyrar býráð viðgjørdi á fundi tann 25. januar 2005 grein frá fyrrverandi borgarstjóra á Tvøroyri Finnleif Guttesen, ið stóð í fjølmiðlunum tann 24. januar 2005. Finnleif Guttesen leggur beinleiðis eftir Kristin Michelsen, borgarstjóra á Tvøroyri, at hann skal hótta tær smáu kommunurnar í Suðuroy í eini samrøðu, ið blaðmaðurin á Sosialinum Áki Bertholdsen, hevði við Kristin Michelsen í Sosialinum tann 22. januar 2005.

Greinskrivarin Finnleif Guttesen vónar, at tað er ikki so galið, at alt Tvøroyrar býráð tekur undir við framferðarháttinum hjá Kristin Michelsen.

Tvøroyrar Býráð samtykti einmælt, at borgarstjórin á Tvøroyri Kristin Michelsen als ikki hevur hótt nakran ella nakra kommunu í Suðuroy, sum Finnleif Guttesen, fyrrverandi borgarstjóri á Tvøroyri, vil vera við í síni grein. Kristin Michelsen borgarstjóri á Tvøroyri hevur hinvegin lagt upp til betri og tættari samstarv á øllum økjum, við allar hinar kommunurnar í Suðuroy, og verður tað hervið enn einaferð staðfest.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 25. januar 2005

Tvøroyrar Býráð

Pauli Einarsson
Jens Johannesen
Sverre Midjord
Jaspur Vang
Marjun Olsen
Bergur Bærendsen

# Føroyingar hava onga skuldarkenslu



**Eyðbjørn Karbech Mouritsen**

Tey seinastu árini hevur verið góð ár fyri føroyskar handverkarar, og nógv haldgóð handverk hava bøtt um tilveruna føroyinga millum. Til alla vanlukku, orsaka teimum føroyingum, ið onga samvitsku hava, verða smápartafeløg ikki rinda pening fyri arbeiðið

Har eru ymiskar áskoðanir um tann føroyska búskapin, men handverkarir hava sum heild úr at gera, fyri at kunna nøkta tann stóra tørvin á arbeiðsmarknaðinum. Føroyingar grópa djúpt niðri í buksulummunum fyri eitt nú at kunna búseta seg í Havn ella útinna teirra verkætlanir heima við hús. Vit vilja øll tað besta fyri okkum sjálvi, og royna standa fram, sum eru vit virkin í einum solidariskum felagsskapi, har vit øll arbeiða fyri hvørjum øðrum.

Einki er ógjørligt, um einans nervarnir og samvitskan hóska til ætlanina. Vendur ein sær til eitt smápartafelag, í tí vón um at fáa eitt arbeiði gjørt, ræður hann eisini yvir hvussu, hvar og nær arbeiðið skal setast í verk. Samstundis hevur hann skyldu og ábyrgd, eins og handverkarnir, at uppfylla tær avtalur báðir partarnir verða samdir um. Tá arbeiðið er liðugt, verður verkið eftirkannað og arbeiðsumkostningarnar rindaðar...teoretiskt sæð. Av ymiskum orsøkum verða avtalurnar ikki altíð yvirhildnar, og peningur verður ikki latin smápartafelagið, sjálvt um arbeiðið er góðtikið, og tá kemur stríð millum partarnar. Um rætt er, eigur tað at verða sæð við sanktiónum sum eykagjald, dagbøtum el.líkn., men ofta er veruleikin ein heilt annar. Teir ótespiligu einstaklingarnir, ið ikki vilja rinda, hava stóran tørv á virðing og samvitsku, og sleppa alt ov lætt undan sakarmálinum. Teir skilagóðu føroyingar, ið tykjast at vera eitt fitt fólkaslag, broytast stórliga tað kemur til pengar. Vælvitandi um teir umkostningar arbeiðið inniberur, gloyma teir alt um ábyrgd og skuldarkenslu. Drivnir av sjálvsøkni og gírni, sníkja teir seg undan og seta smápartafelagið og arbeiðarnar í eina keðiliga tívstøðu. At koyra sakarmálið fyri rættin tekur tíð, og tað loysir seg sjálvdan, tí tað krevur nógva orku og vilja. Flest fólk vita av hesum, men kunnu ikki gera nakað við tað. Nøkur gera brúk av hesum, og manipulerað seg ígjøgnum skipanina, og koyra harvið fyritøkur út í eina búskaparliga kreppu. Hvar er moralurin? Eitt dømi er, at hendan snildin verður nýtt mótvegis einum múrara, ið arbeiðir í teimum nýggju íbúðunum uppi við Løgmannabreyt. Verður byggjiharrin nevndur er hann kendur. Múrarin er eisini akkurát blivin lumpaður av okkara fyrimyndarliga politikara, Høgna Hoydal. Um tey fólk vit virða og hava mest álit á, ikki kunnu standa við síni orð; loysir tað seg so at arbeiða sjálvstøðugt í Føroyum?

Høgni Hoydal talar um, hvussu eitt nú Danmørk hevur loyst málsøki, ið eita seg fyri at hava við Føroyar at gera, uttan at kunna føroyingar um støðuna. Danmørk varð hildin sum syndabukkur vegna kreppuni í Føroyum, og tí eiga vit, at skilja okkum av við danskarar. Eg eri eingin serfrøðingur innan hesum øki, um yvirhøvur nakar er, men tað tykist sum um Høgni Hoydal blæsur við mjølið í munninum, tá tað handlar um at definera "falsloysi/svik". Kanska vil hann ikki hava nakað við múraran at gera, tí hann er danskari???

# FRÆLSI - ER OKKARA MÁL



VAL05

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins*

Ágangurin frá øðrum flokkum er øðiligur. Men vit halda fram at stríðast. málini eru hugsjónirnar og bjørtu vónirnar um eitt betri og meira rættvíst samfelag, ið vit, saman við tær, vilja skapa. Vit vilja byggja upp heimsins besta land í Føroyum.

Gamalt er, at tómar tunnur skrambla mest. At hetta orðatak er rætt, hava vit sanniliga sanna, bæði niðri á Fólkatingi, og í føroyskum politikki, har fullveldisgangurin gjørdi, at vit nú hava hall á fíggjarlógini – eins og vit ávaraðu um. Tá vit ávaraðu, vóru vit skýrdir at mála svart.

Men tað er ein sannroynd, at um ein rekur vánaligan politikk, so fær fólkið tíverri eina rokning at gjalda – ofta nøkur ár seinni. Og tað gera føroyingar nú – ímeðan fullveldisfólk bjóða til cafeskemt.

Vit hava ikki tíð til skemt – vit arbeiða við at rekja fløkjustampin eftir loysingarsamgongurnar frá 1998.

Tjóðveldi gav okkum enn einaferð ein tóman landskassa í 2003 eins og vit fingu hann tóman frá teimum í 1988.

Vit vilja frælsi í Ríkisfelagsskapinum. Tað frælsi er so nógv størri og betri enn loysingarfrælsi, ið bindir føroyingar niður.

Við okkara frælsi, kunnu enn fleiri føroyingar fjølgast og liva í Føroyum. Við "loysingarfrælsinum" mugu einir 15.000 - 20.000 føroyingar flyta av landinum.

Ríkisfelagsskapurin er ikki bert ríkur uppá pening, men eisini uppá virðir sum útbúgving, barnarøkt, familjupolitikk, eldrapolitikk, heilsupolitikk, verjupolitikk, valutapolitikk, uttanríkispolitikk, ja vit eru ríkir og frælsir í ríkisfelagsskapinum. Við loysingini verður alt hetta mist!

VEL FRÆLSI
VEL TRYGT

# Øll sama møguleika at útbúgva seg



VAL05

**Góðu tit ungu, latið ikki teir stóru útbúgvingarmøguleikar, sum vit í dag taka sum eina sjálvfylgju, detta niðurfyri.**

**Edva Jacobsen, Fuglafjørður**
*Sambandsflokkurin*

Á útbúgvingarøkinum hava vit eitt sera gott samstarv við Danmark sum ein partur av ríkinum, og okkara ungu hava góðan møguleika at fáa sær eina útbúgving.

Heili 95% av teimum føroyingum, sum hava tikið hægri útbúgving, hava lisið í Danmark.

Ríkisfelagsskapurin gevur lesandi føroyingum øll hesi rættindi:

- Einki gjald fyri útbúgving í Danmark.
- Útbúgvingarstuðul úr Danmark á jøvnum føti við danir.
- Atgongd at søkja stuðul úr øllum granskingarráðum í Danmark.
- Søkja um kamar at búgva í á jøvnum føti við danir.

Góðu tit ungu, latið ikki hesar stóru møguleikar, sum vit í dag taka sum eina sjálvfylgju, detta niðurfyri.

Farið tí á val og seti X við lista B. Tað er einasti flokkur sum 100% gongur inn fyri einum framhaldandi samstarvi við Danmarki.

Samstarv er vegurin fram.